**FØROYA HANDILSSKÚLI**

Marknagilsvegur 77
Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tlf 317177
Fax 313374
www.fh.fo





Føroya Handilsskúli

# FRÁ MIÐNÁMI TIL HÆGRI ÚTBÚGVINGAR

Á Føroya Handilsskúla eru fleiri ymiskar útbúgvingar frá miðnámsstøði til hægri útbúgvingar. Hóast útbúgvingarnar eru ymiskar, hava tær allar tað til felags at tær á ymsan hátt snúgva seg um handil, búskap og KT.

**Miðnám**

Á miðnámsstøði kanst tú taka yrkisútbúgvingina FHS, ið er ein 1 ára støðisútbúgving, sum gevur atgongd til 2 ára HH og lærlingaútbúgvingarnar. Eisini ber til at taka yrkisgymnasialu HH útbúgvingina, ið tekur 3 ár – ella 2 ár um tú frammanundan hevur FHS.

Eins og á øðrum miðnámsútbúgvingum hava lesandi lærugreinar sum eitt nú føroyskt, samfelagslæru, støddfrøði, søgu, danskt og enskt. Til ber eisini at velja ymiskar vallærugreinir. Serstakt fyri miðnámsútbúgvingarnar á Føroya Handilsskúla er at lesandi eisini hava ymiskar merkantilar lærugreinar, eitt nú virkisbúskapur, sølubúskapur, vinnulívsrætt og altjóða handil.

**Hægri útbúgvingar**

Brennir tú fyri KT, so er teldustøðingaútbúgvingin ein møguleiki. Tað er ein KT útbúgving, sum tekur 2½ ár fulltíðarlestur. Tú lærir um eitt nú tøkni, forritan, systemmenning og virki. Umframt at tað á útbúgvingini eru ymiskar vallærugreinir og praktikkur. Útbúgvingin byrjar næstu ferð í september 2011

Til tín sum ynskir at taka hægri útbúgving, samstundis sum tú arbeiðir, ber til at taka parttíðar útbúgvingar.

Ein møguleiki er at velja HD, sum er sett saman av HD 1. parti – ein grundleggjandi búskaparlig útbúgving og HD 2. parti – har tú kann sergreina teg við at lesa Roknskap sum fjarlestur í samstarvið við Handilsháskúlan, Århus Universitet. Upptøka á HD er vanliga annað hvørt ár, næstu ferð eftir ætlan í september 2012.

Ein annar møguleiki er Akademiútbúgvingin, har tú kann seta saman lærugreinar í mun til egin ynskir og tørv. Til ber at velja ymiskar breytir, eitt nú innan búskap, marknaðarførslu, logistikk ella leiðslu. Á Akademiútbúgvingini er upptøka hálva hvørt ár, tá nýggjar lærugreinar vera bodnar út.

Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 400 næmingar á Hægri Handilsskúla (HH), sum er ein 3 ára gymnasial útbúgving, og umleið 150 á grundútbúgving innan Fyrisiting, Handil og Skrivstovu (FHS), sum tekur eitt ár, og gevur atgongd til lærlingaútbúgving og til 2-ára HH, har FHS telur sum tað fyrsta árið av trimum. Undirvísingin fer fram í Havn pg á Kambsdali. Í Havn starvast umleið 35 lærarar og á Kambsdali umleið 30. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri skrivtovulærlinga- og handilslærlingaútbúgving og fyri hægri útbúgvingum sum HD og Akademiútbúgving.

Nærri kunning um allar útbúgvingar á Føroya Handilsskúla á heimasíðu okkara *www.fh.fo*



„Fiskivinnuskúlin er ein góður skúli. Her eru varierandi frálæruhættir, og eg fái góðar møguleikar at útbúgva meg víðari. Eg kann fara beint út í vinnulívið, og eg kann eisini taka eina universitetsútbúgving í øllum teimum fakum, eg ynski mær.“

*Les meira her:* **www.fiskvest.fo**

„Eg vil avgjørt mæla øðrum til at fara á hendan skúlan. Hann er deiliga heimligur, næmingar og lærarar samstarva væl, og samanhaldið er genialt. Talið á næmingum er eisini akkra fyri. Man kennir øll og sær altíð onkra smekkra sild. Alt í alt amazing!“

„Tað besta við skúlanum er fjølbroytnið í frálæruni. Her eru øll vanlig fak, men vit sita ikki inni 24/7. Vit fara eisini út á virkir, eru á laboratorium og uppliva náttúruna. Havi roynt annan miðnámsskúla, og tað kann slett ikki samanlíknast við hetta.“

SENDISTOVAN

**Fiskivinnuskúlin í Vestmanna er ein gymnasialur tilfeingisskúli, sum tekur trý ár. Her hevur tú flestøll miðnámsfak sum føroyskt, enskt og kunningartøkni, men tú lærir eisini onnur fak, sum tú ikki sært aðrastaðni.**

**FISKIVINNUSKÚLIN**
**Tilfeingisskúlin**